## UTTAN ÚR HEIMI

# Kvinnurnar koma

**Tey seinastu tíggju árini eru altsamt fleiri kvinnur komnar á politiska pallin, men enn er langt til javnstøðu.**

POLITIKKUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Sæð við javnstøðueygum hava teir seinastu dagarnir verið góðir. Sunnudagin fekk Suðuramerika fyri fyrstu ferð eina kvinnu í eitt forsetaembæti, tá Michelle Bachelet vann forsetavalið í Kili. Í gjár fekk Afrika sín fyrsta kvinnuliga forseta, tá Ellen Johnson-Sirleaf varð sett í embætið sum forseti í Liberia, og úrslitið av finska forsetavalinum sunnudagin bendir á, at har verður Tarja Halonen afturvald í seinna valumfarinum.

-Tey seinastu tíggju árini eru altsamt fleiri kvinnur komnar upp á tær ovaru politisku røkurnar, sigur granskarin Mala Htun á New School University í New York við Newsweek. Í Suðuramerika kemst tað av, at har hava myndugleikarnir sett eitt minstamark fyri, hvussu fáar kvinnur kunnu sita í tingunum. Argentina var tað fyrsta landið har við tílíkari skipan, og í dag er triði hvør tinglimur hart kvinna.

Í Brasil er gongdin tann sama, og herfyri vísti ein meiningakanning, at 74 prosent av veljarunum eru til reiðar at atkvøða fyri einari kvinnu sum forseta, og at 57 prosent vænta eina kvinnu sum forsetavalevni innan 20 ár.

### Forðingar

ST hevur gjørt upp, hvussu tað hevur gingist við javnstøðuni tey tíggju árini síðani ta stóru kvinnuráðstevnuna í Beijing í 1995. Niðurstøðan er, at kvinnur hava lættari við at koma sær fram í politikki enn í øðrum sambandi. Í dag eru 16 prosent av øllum heimsins tjóðartingslimum kvinnur ímóti níggju prosentum í 1995. Orsøkin til, at ójavni framvegis er ímillum kynini, er sambært ST, at vanliga hava kvinnurnar lægri útbúgving enn menninir, tær hava minni inntøku, og tað eru fleiri arbeiðsleysar kvinnur enn menn.



*Ellen Johnson-Sirleaf er fyrsta kvinnan, sum situr í einum forsetaembæti í Afrika.*

Samanumtikið eru fleiri kvinnur uppi í politikki í teimum ríku londunum, men soleiðis er kortini ikki allastaðni. Eitt nú eru 15 prosent av limunum í amerikonsku Kongressini kvinnur, meðan helmingurin av tjóðartingslimunum í einum av heimsins fátækastu londum, Rwanda, eru kvinnur. Men Rwanda er eisini tað landið í heiminum, har kvinnurnar eru best umboðaðar í tinginum.




*Al Gore*

# Óheftur ákæri skal kanna avlurtingarmálið

**Fyrrverandi amerikanski varaforsetin Al Gore heldur, at ein óheftur ákæri eigur at kanna, um George W. Bush, forseti, hevur brotið lógina.**

USA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Hevur amerikanski forsetin heimild til at geva trygdartænastuni NSA loyvi til at avlurta telefonina hjá einstøkum persónum?

Hesin spurningurin hevur fingið nógva umrøðu í amerikonskum fjølmiðlum, síðani tað kom fram, at forsetin hevði givið NSA loyvi til at lurta eftir telefonsamrøðum hjá persónum, sum møguliga kundu setast í samband við yvirgang. Forsetin heldur uppá, at hann fekk hesa heimildina frá Kongressini aftan á atsóknina 11. september í 2001, men demokratarnir og fleiri hóvligir republikanarar í Kongressini siga, at slíka heimild hevur hann ikki fingið.

Fyrrverandi varaforsetin Al Gore heldur málið vera so álvarssamt, at hann mælir Alberto Gonzales, løgmálaráðharra til at lata ein óheftan ákæra kanna málið. Áðrenn hann gjørdist løgmálaráðharri, var Gonzales løgfrøðiligur ráðgevi hjá forsetanum, og tí kann hansara niðurstøða ikki metast sum óheft, sigur Al Gore.

miðlahúsið
í Vágsbotni

**Autisma og visjón 2015**

Almennur pallborðsfundur verður í Miðlahúsinum í Vágsbotni týskvøldið 17. januar kl 19.30 við heitinum:

**Hava fólk við autismu tað líka so gott sum tú og eg í 2015 – og hvat gera vit meðan vit bíða?**

Tey, ið luttaka á fundinum verða:

Lennart Pedersen, sálarfrøðingur og fakligur ráðgevi frá Center for Autisme í Danmark

Morten Carlsson, foreldur og formaður í Landsforeningen Autisme í Danmark

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í Almanna- og Heilsumálarráðnum

Umboð frá Mentamálaráðnum og Sernámsdeplinum

**LFA – Landsfelagið fyri fólk við autismu**

**BYGDAFELAGIÐ VARÐIN**

**skipar aftur í ár fyri**



**FØROYSKUM DANSI Í BYGDARHÚSINUM Í HÓSVÍK**

**leygarkvøldið 21. januar kl. 22.00**

**Kostnaður 50 kr. íroknað kaffi, te og breyð**

**Øll eru hjartaliga vælkomin**

**BYGDAFELAGIÐ VARÐIN**

